▶ Paula Abdul er øgvuliga tíðarhøskandi í einum av heitastu tekstilunum beint nú: blondum. Kjólin er seymaður í einum øgvuliga vøkrum havfrúusniði.



▲ Megan Fox hevur peppað tann lítla svarta upp við gullbrokadu, sum eisini hevur verið nógv at sæð í ár.





KANSKA MYNDIRNAR EISINI KUNNU GEVA ÍBLÁSTUR TIL KLÆÐINI Á ÁRSINS PLANETHANDAN

◀ Angelina Jolie og Brad Pitt. Jolie er í einum einføldum svørtum kjóla við vøkrum smálutum. Tilhoyrið, ein ovurstórur grønur ringur og oyraringar, seta famøsa prikkin yvir í'ið. Pitt er í einum skyggjandi, svørtum klæðningi, hvítari skjúrtu og butterfly, sum veruliga hevur verið nógv at sæð í ár. Svørtu knapparnir geva eina stuttliga effekt.



▲ Viola Davis í einum av vakrastu kjólunum á Oscarhandanini í ár. Aftur síggja vit skyggjandi gulllitta toyið.

▼ AnnaLynne McCord á the Young Hollywood Awards. Reyðu varrarnar geva ein jólaligan dám, og tað sama ger stóra sloyfan um miðjuna. Gott hugskot til Planet



Eydna Skaale · eydnaskaale@hotmail.com

# GALLAKLÆÐI Í 2009 Á REYÐA TEPPINUM

Karmarnir um ársins Planethandan skulu vera so góðir og festligir sum gjørligt, og tí verður heitt á fólk um at koma veistlu- og gallaklødd. Tey flestu munnu hava stás frá jólaborðhaldum og jólunum fremst fyri í skápinum, so tað skuldi helst ikki verið tann stóri trupulleikin at funnið fram aftur sunnukvøldið 27. desember.

Vit líta her aftur á nakrar løtur, sum hava verið á reyða teppinum til ymsar heiðurslønahandanir úti í heimi.

▼ Unga sangarinnan og sjónleikarinnan Hayden Panettiere á Young Hollywood Awards. Í einum knallreyðum, asymmetriskum kjóla, ið gongur upp á aðra økslina. Nakað, vit hava sæð nógv av í ár. Og aftur síggjast knallreyðu varrarnar.



▲ Daniel Craig í klæðningi frá Tom Ford við skyggjandi reversi, hvítari skjúrtu og butterfly. Reversið er bogað og hvítið servietturin í lummanum geva nakað eyka. Hon er somuleiðis í mótarøttum korallittum kjóla. Ein litur, ið hevur verið sera nógv nýttur í 2009.

▼ Tær fimm damurnar í Girls Aloud hava allar, hóast stílur og kjólasnið eru sera ymisk, latið seg í puturlittar kjólar. Tað puturlitta hevur verið ein "mást hava" litur í ár.







▲ Sangarin Seal koyrir einfalda stílin við mattum, svørtum klæðningi, hvítari skjúrtu og slipsi.